**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin

# Sjúkrarøktarfrøðingur til B6

Á B6 eru hesi størv leys til setan frá 1. oktober 2006 ella eftir avtalu:

2 størv á 1,0 brøk í skiftandi vaktum. Møguleiki er fyri lægri brøki.
1 starv á 0,6 brøk í náttarvakt. Avspák er innbygt í rulliplanina.
1 avloysarastarv á 0,8 brøk í skiftandi vaktum til og við 31. august 2007.

Deildin tekur ímóti innkallaðum og akuttum sjúklingum og hevur 15 seingjapláss og hesar sergreinar:
- gastroenterologi
- neurologi
- endokrinologi
- onkologi
- hæmatologi

Arbeitt verður eftir kontaktpersónsskipanini.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**
- røkt og viðgerð til sjúklingar innan áðurnevdu sergreinum

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu

**Fyrimun** hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.

Vegna umvælingar og umleggingar á seingjadeildum á medisinska deplinum, hækkar seingjatalið til 18 seingjapláss frá 1. september 2006 og árið út. Deildin letur aftur primo 2007 vegna umvælingar í uml. 2-3 mánaðar, og røktarstarvsfólkini á B6 verða tá flutt á aðra medisinska deild hetta tíðarskeiðið, til umvælingar á B6 eru lidnar.
Aðrar spennandi avbjóðingar liggja eisini fyri framman við implementering av THS (Talgild Heilsu Skipan) í 2007.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja til Ingun Gaardbo, deildarleiðara, tlf. 304500, lokal 6026.

**Løn- og setanartreytir** smb. sáttm. millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfr. og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 25. august 2006 kl. 12.00.
*Tað er umsøjkarans ábyrgd, at umsóknin er á starvsfólkadeildini, áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn**, merkt »umsókn til starv« við CV, autorisatión, avrit av prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin

# Sjúkrarøktarfrøðingur til E3/E2

Á **E3/E2** eru 3 avloysarastørv á starvsbrøki 0,8 í skiftandi vaktum leys at søkja til setan 1. oktober ella eftir avtalu til og við 31. mars 2007.

E3 er ein medisinsk deild við 9 seingjaplássum frá 1. september. Sergreinin á deildini er uppvenjing av sjúklingum við apopleksia cerebri og við diss. sclerosu. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við røktarstarvsfólk, fysioterapeutar, ergoterapeutar og talupedagog. Dentur verður lagdur á gott samstarv við avvarðandi og við primertænastuna.
E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 eldri búfólkum. Vit ynskja starvsfelagar við áhuga og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- fakligan áhuga innan sergreinirnar

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv
- fakliga menning
- góða innleiðslu

**Fyrimun** hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.

Spennandi avbjóðingar liggja fyri framman, tí E3 skal flyta á eina nýumvælda med. deild í 2007. Umvælingarnar byrjaðu 1. maj 2006 á seingjadeildunum B6, B7 og B8. Hesar verða ætlandi lidna fyrru hálvu 2007, so E3 kann flyta yvir tá.
Aðrar spennandi avbjóðingar liggja eisini fyri framman við implementering av THS (Talgild Heilsu Skipan) í 2007.

**Nærri fæst at vita** við at ringja til Monicu Brickman deildarleiðara, tlf. 304500, lokal 6012.

**Løn- og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 21. august 2006 kl 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábygd, at umsóknin er á starvsfólkadeildini, áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn**, merkt »umsókn til starv« við CV, autorisatión, avrit av prógvum, skjølum o.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

**VINNUMÁLARÁÐIÐ**

## Vinnumálaráðið søkir eftir fulltrúa

Fyri løgfrøðing í farloyvi søkir Vinnumálaráðið eftir løgfrøðingi frá 1. september 2006 og 12 mánaðir fram við møguleika fyri føstum starvi.

**Arbeiðið**
Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru:
- At veita landsstýrismanninum og stjóranum løgfrøðiliga ráðgeving
- At gera uppskot til lógir og kunngerðir
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv (cand.jur.). Umsøkjarar, ið hava staðið bachelor útbúgving í løgfrøði, eru eisini vælkomnir at søkja.

Umsøkjarar við viðkomandi royndum hava fyrimun.

Harumframt skulu umsøkjarar duga føroyskt og enskt væl og hava kunnleika til EDV.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya. Setanin fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir Vinnumálaráðnum, umframt onnur stjórnarráð.

Umsókn, saman við prógvum, CV, viðmælum o.ø., skal verða send til

**Vinnumálaráðið**
**Postsmoga 377**
**110 Tórshavn**

Freistin at søkja er ***fríggjadagin 18. august 2006.***

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Arna Poulsen, stjóra, tlf. 356070.

**TOYOTA**
**reservedele**

Vi kan tilbyde Danmarks største udvalg i nye og brugte reservedele til Toyota.

**Vi sender fra dag til dag til Færøerne.**

DKAUTO.DK
AUTOGENBRUG - SPECIALE TOYOTA
Flensborgvej 340 - 6200 Aabenraa
tlf. +45 7461 4110 - fax +45 7461 4164
email: salg@dkauto.dk - www.dkauto.dk

Forhenværende
Aabenraa Autogenbrug

ISO 9001
certificeret

DAG
Dansk Autogenbrug

Autoophuggernes DATALAGER DK